## Løgmálaráðharrin sinnaður til yvirtøkur



**Frank Jensen, løgmálaráðharri, er sinnaður at lata føroyingar yvirtaka løgreglu og rættarskipan við tilhoyrandi umsiting. Fyrireikingarnar skulu vera lidnar í 2002, og politisk støða tikin í 2003, skýtur løgmálaráðharrin upp**

YVIRTØKA
*Edvard Joensen*

Á fundi í løgmálaráðnum mikudagin hevur Frank Jensen, løgmálaráðharri, sagt seg sinnaðan at lata føroyingar yvirtaka løgreglu og rættarskipan.

Setast skal ein arbeiðsbólkur at avgreiða málið, samstundis sum lógarverk skal gerast í Føroyum, sigur Frank Jensen í tíðindaskrivi, at hann hevur skotið upp fyri Høgna Hoydal, landsstýrismanni við lógarmálum.

Talan er um uppskot frá dønum til føroyingar fyri at koma víðari við málinum, sigur Frank Jensen í tíðindaskrivinum.

Hann sigur eisini, at hann hevur heitt á Høgna Hoydal um at viðgera máli gjølla í landsstýrinum og síðan venda sær aftur til donsku stjórnina.

Arbeiðsbólkurin skal vera liðugur við sítt arbeiði í 2002 og politiska viðgerðin hjá landsstýrinum og stjónini skal vera liðug í 2003 ,og yvirtøkurnar fara fram komandi árini.

## Løgtingssamtyktin skal fylgjast



**Høgni Hoydal, landsstýrismaður, fegnast um toybilið í samráðingunum við løgmálaráðharran. Men teir eru iki heilt samdir, sigur hann**

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

Hóast hann fegnast um, at løgmálaráðharrin hevur slept onkrum av sínum krøvum, krevur landsstýrismaðurin við lógarmálum, at løgtingssamtyktin um sjálvstýri Føroya Fólks skal fylgjast.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, fegnast um, at løgmálaráðharrin nú hevur slept kravinum um broytingar í Heimastýrislógini, tá tosað verður um yvirtøku av rættarmálum og løgreglu.

Men Høgni Hoydal vil ikki ganga við til at seta ein felags arbeiðsbólk at viðgera málini.

– Tað fer bara at draga málið út og í ringasta føri gera, at einki hendir, sigur hann.

Hinvegin vil Høgni Hoydal hava tveir arbeiðsbólkar. Ein føroyskan og ein danskan, sum hvør sær skulu gera skjótt av.

– Eg havi sagt løgmálaráðharanum, at løgtingssamtyktin um sjálvstýri Føroya fólks skal fylgjast. Og eg havi eisini sagt honum, at persónsfamlju- og arvarætturin skulu vera yvirtiknir í seinasta lagi 1. januar komandi, segði Høgni Hoydal í stuttari viðmerking við Sosialin, beint eftir, at fundurin var liðugur.

# Brúkarastovnur er neyðugur



*Brúkarapolitikkur er forsømt øki í Føroyum. Men tað skal nú broytast, sigur Hans Pauli Strøm*

**Javnaðarflokkurin skjýtur upp at seta á stovn ein brúkrastovn undir leiðslu av brúkaraumboðsmanni, sum skal røkja áhgamál brúkarans. Hetta skal vera liður í nýggja brúkarapolitikkinum, sum flokkurin hevur boðað frá**

BRÚKARAVERJA
*Edvard Joensen*

Ein nýggjur brúkarastovnur skal setast á fíggjarlógina. Hesin stovnur skal taka sær av teimum málum, sum eitt nú Brúkarafleagið og Príseftirlitið fyrr høvdu, fer Javnaðarflokkurin at skjóta upp fyri tinginum.

Javnaðarflokkurin vil hava ein almenn brúkarastovn at taka sær av áhugamálum brúkarans. At stjórna stovninum skal setast ein brúkarumboðsmaður, og ein kærunevnd skal setast at taka støðu til kærur frá brúkarum, sum ikki meta seg hava fingið ta vøru, teir hava keypt.

Javnaðarflokkurin metir tað neyðugt at seta ein almennan brúkarastovn, sum kann taka sær av teimum áhugmálum, vanligi brúkarin dagliga hevur. Sum er er bara kappingarlógin galdandi á økinum. Men hon er ikki gjørd til at verja brúkaráhugmálini, sigur Javnaðarflokkurin. Heldur er hon gjørd sum ein útbjóðaralóg. Tað vil siga at tryggja seljarunum javna kapping.

Saman við álitinum um brúkarapolitikk og brúkarastovn hevur Javnaðarflokkurin eisini lagt fram tvey lógaruppskot. Uppskotini eru til lóg um marknaðarføring og lóg um brúkarakærunevndina.

### Broytt samfelag

Á tíðindafundi mikudagin, segði Hans Pauli Strøm, tingmaður, sum er ein av trimum limum í arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt uppskotini, at neyðugt er við einum skipaðum brúkarapolitikki, nú vit seinnu árini hava havt ein øgiligan nýtsluvøkstur. Útboðið er broytt munandi, og nógvir nýggir brúkarabólkar eru komnir. Serliga nevndi hann børn og ung, sum stórur ágangur er á fyri at fáa tey at keypa bæði líkt og ólíkt.

– Tað er ein vónleys uppgáva hjá hvørjum einstøkum brúkara at hava tann neyðuga kunnleikan um alt hetta útboðið, sigur Hans Pauli Strøm.

Víst verður eisini við tølum á í álitinum, sum komið er, hvussu nýtslan hjá einum vanligum húsarhaldi er broytt seinastu 30 árini.

Eitt nú vóru vørubólkarnir matur og drekka í 1972 heili 42,1 prosent av samlaðu húsarhaldsnýtsluni, meðan tey í dag bara eru umleið helvtin, ella 21,3 prosent.

Tað kemst av, at fólk hava so øgiliga nógv annað at brúka pengar til, sum tey eisini, gera, vísir Hans Pauli Strøm á.

Bara tann bólkurin, sum skrásettur verður sum frítíð og mentan, er vaksin úr 1,9 til 11,9 prosent. Her í liggur slíkt sum frítíðarítriv, konsertir, matstovuvitjanir o.ta, sum fólk brúka pengar uppá.

### Stovnurin

Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at brúkarastovnur, -nevnd, -umboð og -kærunevnd verða samansjóðað í eina eind, so tað verða somu fókini, sum koma at taka sær av teimum málum, sum brúkarin fer at biða brúkarastovnin taka sær av. Soleiðis fæst besti sakkunnleikin, sum so aftur eigur at koma brúkaranum til góðar, sigur Javnaðarflokkurin.

Sett verður eitt brúkaraumboð, sum er stjóri á brúkarastovninum og samstundis formaður í kærunevndini. Allir partarnir fara at hava felags skrivstovu, sum bæði fer at gera arbeiðið lættari og bíligari, sigur Javnaðarflokkurin í uppskotinum.

Nýggi stovnurin skal rekast sum rakstrarstað á fíggjarlógini. Tað fer ikki at hava nakran serliga stóran eykakostnað við sær, sigur Hans Pauli Strøm, sum vísir á, at kostnaðarmeting er gjørd, sum vísir, at stovnurin fer at kosta 2,2 milliónir árliga.

Í hesum er roknað við einum brúkaraumboði, sum er stjóri, einum fulltrúa og einum vanligum skrivstovufólki. Samlaðu lønarútreiðslurnar verða mettar til hálvaaðru millión, meðan restin verður roknað til keyp av vørum, tænastum, útbúnaði, leigu og øðrum.

Í arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt álitini um brúkarapolitikkin og brúkarastovnin eins og lógaruppskotini um marknaðarføring og brúkarakærunevnd, hava sitið umframt Hans Paula Strøm, Sigrid Dalsgaard og Hans Jørgensen.



# Føroya Prentarafelag fimmti



*Benny Samuelsen var skrivari í fyrstu nevnd Føroya Prentarafelags*

**-2 6. septembur í 1951 varð Føroya Prentarafelag sett á stovn. Áðrenn høvdu allir prentarar verið limir í hondverkaradeildini hjá arbeiðarafelagnum, og eftir Handverkarafelagið varð stovnað í 1950, vóru teir limir har.**

PRENT
*Ingrid Bjarnastein*

Sjálvan fimmti ára dagin hjá Føroya Prentarafelag var receptión á Hotel Hafnia fyri núverandi og fyrrverandi limum í felagnum, og samskiftisfólkum teirra.

Føroya Prentarafelag varð fakfelag fyri setarar og trykkjarar í Føroyum, sum vanliga gingu undir heitunum prentarar. Nú teldurnar eru høvuðsamboðini, eru heitini broytt til grafikarar og grafiskir trykkjarar; men felagið hevur framvegis navnið Føroya Prentarafelag.

Prentlistin kom til Føroya longu í 1852, men ikki fyrr enn nærum 100 ár seinni fingu teir egið felag.

Fyrstu nevndarlimirnir í felagnum tá vóru Esmar A. Jacobsen, formaður, Martin Thomsen, kassameistari og Benny Samuelsen, skrivari.

Til receptiónna helt Benny Samuelsen eina røðu um arbeiðið hjá prentarunum á blaðsmiðjunum fyrr. Tá varð alt, sum skuldi prentast sett upp við blýggj og leysum stavum, og var tað ofta ikki fyrr enn klokkan 3-4 um náttina, at bløðini vóru klár.

Nú til dags eru ógvuliga fáir prentarar, ið arbeiða við blýggi. Nú verður alt sett upp við teldum. Tað eru bert tvær prentsmiðjur í Havnini, ið framvegis arbeiða við blýggi.

Føroya Prentarafelag hevur í dag umleið 50 limir.



*Esmar A. Jacobsen, fyrsti formaður og eldsálin í felagnum*

eru nú

FAROESOFT
EITT FARODANE FELAG



*Í sambandi við at vit hava skift navn og eru flutt, bjóða vit viðskiftafólkum og øðrum áhugaðum til móttøku í nýggju hølum okkara í*
***Tórsgøtu 16,***
***fríggjadagin 28. september***
***kl. 15.00-17.00***

Farodane 09-01

FAROESOFT
Tórsgøta 16 • Postboks 3119 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 350 350 • Fax. +298 350 360 • faroesoft@faroesoft.com
www.faroesoft.com